BÝRÁÐSSKRIVSTOVAN TVØROYRAR BÝRÁÐ
www.tvoroyri.fo · tvoroyri@tvoroyri.fo · tlf 611085 · fax 371814 · postboks 80 · FO 800 Tvøroyri

Tvøroyri, 22. januar 2018
Jour. nr. 81.07.00-1-17
Skriv: HWJ

# MANNAGONGD

**Í sambandi við, at næmingar í Tvøroyrar skúla eru í starvsvenjing á rakstrarstøðum hjá Tvøroyrar kommunu**

Henda mannagongd er gjørd sambært samtykt hjá Tvøroyrar býráð tann 11. desember 2017.

Innihaldið í mannagongdini er tilevnað við støði í rundskrivi hjá lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum frá 2003 nevnt *"Rundskriv um samsýning til lesandi og skúlanæmingar í starvsvenjing"*.

**Virkisøki**

1. Mannagongdin fevnir um næmingar hjá Tvøroyrar skúla, sum eru í starvsvenjing á rakstrarstøðum hjá Tvøroyrar kommunu.

**Skúli og rakstrarstað avtala starvsvenjing**

2. Tvøroyrar skúli avtalar starvsvenjingina hjá næminginum beinleiðis við leiðaran á rakstrarstaðnum hjá Tvøroyrar kommunu.

**Uppgávan hjá rakstrarstaðnum**

3. Leiðarin á rakstrarstaðnum leggur arbeiði hjá skúlanæminginum soleiðis til rættis, at talan er um smærri arbeiðs-uppgávur runt á rakstrarstaðnum, sum svara til førleikan hjá einstaka næminginum.

4. Vísandi til pkt. 3, so skal leiðarin á rakstrarstaðnum – áðrenn starvsvenjingin hjá næminginum byrjar – hava gjørt eina skrivliga mannagongd um arbeiðsgongdir á rakstrarstaðnum, sum næmingurin fær kunning um, tá starvsvenjingin byrjar.

5. Leiðarin á rakstrarstaðnum kunnar umsitingina hjá Tvøroyrar kommunu um navnið á skúlanæminginum, tá starvsvenjingin er liðug.

**Samsýning**

6. Skúlanæmingur, sum er í starvsvenjing á einum av rakstrarstøðunum hjá Tvøroyrar kommunu, fær kr. 500,- í samsýning. Umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu flytir skúlanæminginum nevndu upphædd á kontu í peningastovni, tá starvsvenjingin er liðug.

**Trygging**

7. Í starvsvenjingartíðini eru skúlanæmingarnir tryggjaðir av Tvøroyrar kommunu.

**Skúlin letur úr hondum frágreiðing**

8. Á hvørjum ári við skúlaársenda skal Tvøroyrar skúli geva umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu eina skrivliga frágreiðing um, hvussu nógvir næmingar hava verið í starvsvenjing, og hvussu starvsvenjingin hevur hilnast. Henda frágreiðing tekur støði teimum báðu frágreiðingunum, sum ávíkavist rakstrarstað og næmingurin lata úr hondum, tá starvsvenjingin er endað.

**Gildiskoma**

9. Henda mannagongd kemur í gildi tann 1. februar 2018.

Tvøroyri, 22. januar 2018.

Kristin Michelsen
Borgarstjóri

Henrik Weihe Joensen
Kommunustjóri